SERNÁMSDEPILIN

# Talilærari

**Í Sernámsdeplinum er eitt starv sum talilærari leyst til setan skjótast til ber.**

**Uppgávur**
Fyribils er høvuðsuppgávan endurvenjing av heilaskaddum vaksnum við talubreki. Í samstarvi við Landssjúkrahúsið fer støðukanningin og fyrsta viðgerðin fram á sjúkrahúsinum. Tá sjúklingurin verður útskrivaður, ger talilærarin tilmælandi frágreiðing og vegleiðir avvarðandi eftir tørvi. Eftir umstøðunum kann talilærarin eisini geva ambulanta viðgerð og í samráð við onnur í samskiftisdeildini í Sernámsdeplinum vegleiða í endurvenjingararbeiði úti um landið.

Talilærarin er ein av tvørfakliga toyminum í Sernámsdeplinum og má vera sinnaður til at átaka sær aðrar sernámsfrøðiligar uppgávur eftir umstøðunum, eins og hann er tilvitaður um setningin hjá Sernámsdeplinum, ið er at menna sernámsfrøðiliga virksemið og tænastustøðið í øllum landinum.

**Førleikakrav**
Útbúgvin talilærari, audiologopedur, pedagogur ella lærari við serlæraraútbúgving ella á annan hátt útbúgvin/ eftirútbúgvin umsøkjari við royndum at arbeiða við taluvenjing/ -viðgerð.

**Løn**
Eftir sáttmála við avvarðandi Fakfelag.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 18. apríl 2008.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo

SERNÁMSDEPILIN

# Avloysari fyri talilærara

Vegna barnsburðarfarloyvi fram til 20. oktober 2008 sóknast vit eftir talilærara til setan skjótast til ber. Høvuðsuppgávan er at veita børnum og ungum (0-18 ár) taluvenjing og at virka í talumennandi arbeiði, harí at vegleiða foreldrum og stovnum/ skúlum. Vant verður við smáum talibólkum í Sernámsdeplinum, men onnur skipan uttan fyri Sernámsdepilin kann eisini koma fyri. Eftir útbúgving og førleika kann tann, ið settur verður,eisini fáa aðrar uppgávur á samskiftisøkinum.

**Førleikakrav**
Útbúgvin talilærari, audiologopedur, pedagogur ella lærari við serlæraraútbúgving ella á annan hátt útbúgvin/ eftirútbúgvin umsøkjari við royndum at arbeiða við børnum.

**Løn**
Eftir sáttmála við avvarðandi Fakfelag.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 18. apríl 2008.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
E – postur: sernamsdepilin@snd.fo

temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**




# Atlagøta og Myllutjørn

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 27. mars 2008 samtykti, at vegurin millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt fær navnið **Atlagøta.**

Býráðið samtykti eisini, at útstykkingin eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla fær navnið **Myllutjørn.**

**Tórshavnar kommuna**

# Stoypa grund?

**Manglar tær at fáa grundina stoypta, garðin ella hjallin, eru vit tey tú manglar.**

**Ring og fá eitt óbindandi tilboð.**

**Vit gera alt stoypiarbeiði – stórt sum smátt.**



# Hús á Signabø 30 til sølu

Norðseturhús snið 85s, bygd 1988. Stykkið er um $650m^2$.

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvi, bussleið 4 steðgar tætt við.

Sí myndir og uppl. á www.spadar5.com/sethus
Tlf. 421419 ella 271441 eftir kl 16

# Seniorskeið

14. - 25. apríl 2008

Fyrlestrar um mentan, list og politikk.
Útferðir og upplivingar

Kostnaður
kr. 2.500.-
Pensiónistar kr. 1.500,-
Vistarhald íroknað

Ringið ella sendið teldupost um gjøllari upplýsingar

*Føroya Fólkaháskúli*
*Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn*
*Telefon 311743 - haskulin@haskulin.fo*

# Frá Tórshavnar bátafelag

Aðalfundur felagsins verður týsdagin tann 22. apríl kl. 19.00 í hølum Starvsmannafelagsins, J. H. Schrøtersgøta 9.

Skrá sambært lógum felagsins.

Mál, sum ynskjast viðgjørd, skulu vera nevndini í hendi seinast 8 dagar framman undan fundinum.

***Nevndin***